DAGSINS MEINING

Fjølmiðlar í fokus

Fjølmiðlarnir eru týðandi partur av politiska valdsbýtinum í einum hvørjum sonnum fólkaræði. Fjølmiðlarnir skulu tryggja, skipa, upplýsa og miðla almenna orðaskiftið og samskiftið. Vit skulu tryggja, at politikararnir standa fólkinum til svars fyri teirra gerðir og avgerðir. Hendan er so at siga idealmyndin av okkara leikluti, og hon eigur at verða tikin í størsta álvara.

Í sambandi við umrøðuna av fullveldisfilminum hevur leikluturin hjá fjølmiðlunum í samfelagnum verið umrøddur. Fjølmiðlarnir eru ov veikir, verður sagt. Teir megna ikki í nóg stóran mun at kunna almenningin um politisku gongdina og um politiska spælið í Føroyum og millum Føroyar og Danmark. Nakað er ivaleyst um hesar atfinningar. Vit eiga at taka í egnan barm og at gerast nógv betri. Men er so alt sagt um pressuna ella fjølmiðlarnar og teirra leiklut sum hitt fjórða samfelagsvaldið? Kann pressan einvíst lastast fyri at vera ov veik í mun til politikkararnar og teirra sterka og vælskipaða embætisverk? Henda søk hevur fleiri síður.

Tey seinastu árini hava vit fingið lóggávu um alment innlit. Hetta skuldi alt annað líka gjørt arbeiðið hjá fjølmiðlunum lættari, men so einfalt er tað ikki. Fleiri halda, at tað er vorðið torføra. Ein orsøkin er, at vit eins og í grannalondum okkara hava fingið eitt nýtt ættarlið av politikkarum, sum einvíst vil stýra kunningini til almenningin. Hetta ættarlið nýtir serfrøðingar,ið taka sær av kunningarstreyminum. Virksemi teirra er at javnmeta við tað hjá spindoktarum. Henda støða er ein nýggj og stór avbjóðing til føroysku fjølmiðlarnar, um teir vilja varðveita tann leiklut,ið teir eiga at hava í samfelagsskipanini. Í hesum sambandi kann verða nevnt, at tað í næstum verður lóggivið um fjølmiðlaábyrgd og um góðan fjølmiðlasið. Hvat henda lóggáva kemur merkja fyri fjølmiðlarnar er torført at meta um, men vit fara at venda aftur til henda spurning seinni.

Fjølmiðlarnir eru nú noyddir til at brynja seg til hesa nýggju støðu, og tað kunnu vit gera eitt nú við at gerast dugnaligari og betri í allar mátar. Vit mugu bøta um førleikarnar hjá okkara medarbeiðarum og vit mugu nýta meira orku til research og læra at nýta lóggávuna um innlit betri. Vit mugu siggja til, at politisk evni og politisk mál í nógv størri mun verða tikin upp til viðgerðar og til orðaskifti og lýst frá øllum síðum. Hetta er alt annað enn lætt í eini støðu, har politikkararnir einvíst vilja gera av, hvat almenningurin skal fáa at vita. Uppgávan hjá pressuni er sostatt ikki bert at kunna almenningin um faktuellar hendingar ella viðurskifti – at bera tíðindi, men at skapa og menna orðaskifti og samfelagstjak. Henda uppgáva verður ikki loyst við at samantvinna tíðindi við politisk ella persónlig sjónarmið. Nakað,ið vit tianverri uppliva alt ov oftani. Vit eiga heldur ikki at gloyma ta týðandi uppgávu, sum fjølmiðlarnar og serliga bløðini hava sum serviceorgan tvs. kunningina um alt tað, sum dag um dag hendir í okkara samfelag. At skipa og menna føroysku fjølmiðlarnar eftir hesum prinsippum er ein stór avbjóðing. Men hetta er ein avbjóðing, sum fjølmiðlarnir eiga at tak í størsta álvara.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Hví kemur tú til Føroya við Íslendska landsliðnum, Eiður Smári Guðjohnsen?

Ivan Eginsson
og Heri Simonsen

Eiður Smári Guðjohnsen

Tað er sera, sera undrunnarvert og næstan átalu vert, at tú kemur til Føroya við íslendska landsliðnum. Felag títt, Chelsea, sum klæðir, føðir og gøðir teg, stríðist fyri at koma í Champions League-bólkaspælið. Og kortini velur tú at koma við landsliðnum hjá einum lítlum landi fyri at spæla ímóti einum enn minni landi, til hvat? Ert tú ikki væl vitandi, at tú kanst blíva skaddur í dystinum ímóti Føroyum á Tórsvølli í Havn? Ein skaði hevði merkt, at tú ikki hevði kunnað verið við í seinna kvalifikasjónsdystinum í Champions League á Stamford Brigde! Og tað, sum verri er: tú kanst koma at missa dystir í bólkaspælinum, og har við nógvan pening og nógvan bonus. Tú átti at verið klókur av gomlum skaða! Tá ið tú, sum blaðungur, hevði leikt saman við núverandi brasilska heimsmeistaranum: Ronaldo í álopinum hjá hollendska PSV Eindhoven, fekst tú ein ræðuligan skaðan yviri í Írlandi í einum fullkomuliga týdningarleysum U-19 landsdysti fyri Ísland. Tú vart uttanfyri fótbólt í tvey ár, orsakað av hesum púra óneyðuga landsliðsskaðanum, og tapti fleiri milliónir í penningi. Tú bleiv jú næstan rørslutarnaður… Kortini meldaði tú teg kláran til at spæla fyri Ísland aftur. Tú ert besti og ríkasti íslendski leikarin nakrantíð, og álíkavæl stillar tú upp fyri lítla land títt, sjálvt um tú kanst blíva meiddur og missa so nógvar pengar! Ert tú býttur, Eiður Smári? Tann múgvandi nýggji Chelseaeigarin, Roman Abramovitj, hevur óiva havt ílt eyga á tær, at tú soleiðis setir teg í vága fyri lítla Ísland við sínum bara 280.000 íbúgvum. Tú setir høgu enskurussisku løn tína uppá spæl! Hví ikki bara venda Íslandi bakið, einaferð og med alla? Tú vinnur einki við Íslandi álíkavæl, tú verður ongantíð heims- ella Evropameistari við teimum. Ísland er als ikki vert, at tú skal umboða teir, teir eru heilt einfalt ikki á tínum støði…

At tú leikar við landsliðitínum, er sjálvandi tín sak, Eiður Smári. Men minst til – vit hava ávarað teg ímóti hesum. Tí at vit í Føroyum, sum onga aðrastaðni, vita væl, hvussu vandamikið og skaðiligt tað er, at leika á landsliðnum…

Altjóða sáttmálar og altjóða frælsi

Kaj Leo Johannesen
Sambandsflokkurin

Vit arbeiða við at gerða sáttmála við Ísland sum telur 260.000 fólk viðvíkjandi teim fýra frælsunum, sum vit altíð tosað um, tá talan er um ES hesi frælsini eru sum kunnugt »frælsur handil av vørum, tænastum, kapitali, og fólki« gevi Løgmanni rætt at hettar er týdningarmikið stig á leiðini at økja okkara heimamarknað, og fari eg at heita á Løgmann um ikki at loyva Íslendingum at lata henda sáttmála galda fyri alt uttan fiskavørur, nú íslendingar fáa loyvi frá okkum eitt nú at keypa almennar fiskivinnufyritøkir, so er tað ikki annað enn rímiligt at Føroyskar fyritøkir hava somu møguleikar í Íslandi, sum Íslendskar fyritøkir fáa í Føroyum.

Tá tað er av týdningi at fáa tey fýra frælsini við Ísland, sum telur 260.000 fólk, hvussu kunnu vit so siga at vit hava ein góðan sáttmála við ES, sum skjótt telur 450 milliónir fólk, hvar tann sáttmálin einki av hesum frælsunum hevur, bert fríðan handil fyri ávísar vørubólkar, sum ikki metast at hótta ES virkir, grundgevingin at teir fara avstað við rávøruni heldur ikki, eftirsum ES virki keyptu uml 50.000 av rundum fiski úr Føroyum í fjør og er hetta met, og at meginparturin av øðrum, sum fiskað var undir Føroyum, fór sum hálvfabrikata ella Ídnaðarvøra, so vit kunnu av røttum siga at ES virki í løtuni fara avstað við Føroysku rávøruni og Føroyskum arbeiðsplássum, eg vóni at vit í framtíðini fara at góðtaka realitetirnir um at gerðast partur av Evropa innan alt ov leingi.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eydun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMER

Somu skattafyrimunir til øll

Kenneth Rasmussen
form. Unga Sjálvstýri

Hesa somu yvirskriftina nýtti undirritaði upp undir løgtingsvalið í fjør og vísti á, at allir løntakarar í samfelagnum skuldu havt rætt til sama skattafrádrátt sum fiskimenn fáa, og at munurin millum fiskimenninar og aðrar løntakarar eigur, sum frá líður, at verði javnaður, so øll eftir nøkrum árum vóru javnsett. Eisini varð víst á, at fiskimenn vóru tann samfelagsbólkurin, sum seinnu árini hevði havt nógv størstu inntøkurnar; og at tað skuldu heilt óvanliga góðar grundgevingar til hjá teimum, sum vilja varðveita hendan óbeinleiðis studningin til fiskivinnuna.

Undirritaði mátti við hesum útsagnum leggja rygg til nógvar ákoyringar, eisini frá mínum egnu partamonnum. Sannleikin tá var júst tann sami sum í dag, at ongin politikari og ei heldur politiskur flokkur torir at verða erligur í hesum málið, tí vandi er jú fyri at nakrar atkvøður rúka.

Ongin regla uttan undantak. Soleiðis var eisini hesaferð. Í hesum føri var undantakið Annita á Fríðriksmørk. Við at vísa á, at tíðin var komin til at strika skattalættan til fiskimenn, gav hon øllum tingmonnum eitt so óvæntað slag undir beltið, at fleiri teirra fullu í løtuóvit (fingu blackout). Allir samlir, ongin undantikin, hava teir, síðan skattalættin kom í gildið í 1998, siti og vóna, at teir ongantíð aftur fóru at hoyra hetta málið umrøtt í tinginum.

Tað er nógv týdningarmikilari at taka støðu til um nakrir svøvnskarvar á einum hólma á Trongisvágsfirði skulu purrast út, ella hvat fiskivinnustevnugestir skulu hava at drekka afturvið matinum og onnur stórmál.

Tá so tingmenn vóru komnir nøkulunda fyri seg eftir óvæntaða slagið frá Annitu, tók onkur orðið og hartaði hana og vísti á, hvussu stóran týdning skattalættin til fiskimenn hevur havt fyri samfelagið. Ein teirra var tjóðveldismaður. Tað undrar ongan, at fleiri tjóðveldismenn eru ósamdir við partakvinnuna á Fríðriksmørk, tí í flokkinum eru allar hugsjónir frá uttasta høgra til uttasta vinstra umboðaðar. Ein annar, sum hevði at Annitu, var fólkafloksmaður. Hesin flokkur, sum sigur seg arbeiða fyri liberalismu og fríari kapping, vísti seg enn einaferð ikki hava rygg til at taka eina støðu, sum hevði noytt teir at traðka onkran á tærnar. Dagin eftir var ein av høvdingum floksins í útvarpinum, har hann við sínum eyðkenda orðavavstri royndi at káva útyvir tað sannroynd, at Fólkaflokkurin, tá alt kemur til alt, er ídnasti studningsflokkurin á tingi.

Nú er ov seint

Nógv hevur verið tosað um at Føroyar skulu hava ein sjálvberandi búskap, sum sjálvsagt eisini er fyrsta treyt fyri, at vit í framtíðini kunna taka fulla ábyrgd av okkara egna landi. Vit minnast øll hvussu støðan var fyri 10 árum síðani, tá føroyski búskapurin fór fyri bakka. Tá vóru serlig tiltøk sett í verk á fleiri økjum, fyri at minka um ógvusligu avleiðingarnar av kreppuni. Tey flestu av hesum kreppuiltøkum eru nú avtikin, men um ætlanin veruliga er, at Føroyar allatíðina skulu hava optimala samanseting av framleiðslu og størstu møguligu virðisøkingina í samfelagnum, er alneyðugt at tann studningur, sum beinleiðis og óbeinleiðis verður latin vinnulívinum verður strikaður.

Eftir at vit í áravís hava havt methøgar fiskaprísir, og veiddu nøddirnar eisini hava verið óvanliga høgar, átti allur studningurin til fiskivinnuna at verði tikin burtur fyri langari tíð síðani. Nú er helst ov seint at fara at minka studningin til fiskivinnuna, tí fiskaprísirnir eru versnar munandi og útlitini eru ikki alt ov góð. Men um nú fiskaprísurin komandi árini fellur enn meira og nødgirnar aftur fara at minka. Skulu vit tá skrúva studningin enn longur upp?

Í Føroyskum Lógar Riti frá november 2002 viðger Eyðfinnur Jacobsen, advokatur, undir yvirskriftini – Hótta serskattaskipanir rættartrygdina? – tær serreglur, sum seinnu árini eru settar í gildi í Føroyum. Hansara niðurstøða er, at serskattaskipanirnar, sum eru settar í gildi, av álvara hava sett til síðis líkagrundregluna og grundregluna um framskygni innan føroyskan inntøkuskatt. Og at sigast kann, at serskattaskipanirnar hótta rættartrygdina viðvíkjandi inntøkuskatting í Føroyum.

Spennandi verður at síggja hvussu roknistykki fyri 2004 fæst at ganga upp…

Føroyingar hittast í London

TÍÐINDASKRIV

Umleið tvær ferðir um árið hittast føroyingar í donsku kirkjuni í London til kirkjugongd og ein døgurða aftaná. Tey, ið skipa fyri eru Marjun Needlestone, Louis Wilson og Marjun Joensen-King.

Hesaferð er gjørt av at hittast sunnudagin tann 14. september. Av tí at umvælingar fara fram í donsku kirkjuni í løtuni verður farið í kirkjuna, All Souls, ístaðin. Ætlanin er fyrst at fara í kirkju og aftan á kirkjugongdina verður farið á turkiska matstovu. Kostnaður fyri døgurðan er £8 fyri tveir rættir. Drykkjuvørur eru ikki íroknaðar.

Áhugað verða biðin um at tekna seg hjá Marjun Joensen-King á tlf. 0208 998 8459 ella t-post: marjun@btopenworld.com. Freistin at tekna seg er mánadagin 8. september.

Skrá
Kl. 11.30 Guðstænasta,
All Souls
Langham Place
London W1B 3DA
Tlf.: 0207 580 3522
Heimasíða: www.allsouls.org

Kl. 13.00 Matstovu,
Ozer Restaurant
5 Langham Place
Regent Street
London W1B 3DG
Tlf.: 0207 323 0505